**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 126/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (**Innlatan og gjaldskái 1. ársfjórðing 2020**)**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 18. mars 2020 og eftir 1. viðgerð 18. mars 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. mars 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Nevndin vísir á, at uppskotið snýr seg um at styrkja gjaldførið hjá vinnuni við umleið 400 mió. kr. komandi mánaðirnar. Hetta verður gjørt við at útseta freistina fyri at lata mvg-uppgerð fyri 1. ársfjórðing 2020 og fyri avrokningina av fyrsta avgjaldstíðarskeiðnum frá 10. mai til 15. november 2020. Hetta forðar tó ikki vinnufyritøkum, ið hava mvg tilgóðar, at fáa tað útgoldið til tíðina. Freistirnar fyri 2. ársfjórðing og frameftir vera óbroyttar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 18. mars 2020**

Magnus Rasmussen
formaður

Bjarni Hammer

Uni Rasmussen

Kristin Michelsen

Bill Justinussen

Kristina Háfoss

Ruth Vang